# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Heiðrað tónleikarar

Um vikuskiftið var sjóneykan sett á føroyskan tónleik, tá ið árliga Planet Awards tiltakið varð hildið. Sosialurin og Rás2 skipa fyri tiltakinum í samstarvi við onnur, og tað er ein fragd fyri okkum í Miðlahúsinum at verða við til at kasta ljós á føroyskan popp og rocktónleik, tá ið árið endar.

Aftur í ár hava vit upplivað, hvat føroyskur tónleikur megnar – bæði á heimliga pallinum og úti í heimi. Vit hava fingið frálíkar fløgur frá nærløgdum føroyskum tónleikarum, vit hava upplivað konsertir, festivalar og framførslur á høgum stigi, og vit hava eisini sæð, hvussu eitt nú Linda Andrews kundi gera øðrum føroyskum sangarum kynstrið eftir og vinna eina stórsligna danska sangkapping.

Føroyskur populertónleikur hevur tað gott, og bæði tá ið hugsað verður um tann framfýsna og freka tónleikin og tann meira mainstream poppin og rockin duga føroyskir tónleikarar at skriva, spæla og geva út sum sjáldan áður.

Sunnukvøldið vóru tey bestu í føroyskum tónleiki heiðrað, og hóast tað verður valt burtur úr rúgvuni, og onkur skal vinna frammanfyri onnur, so er endamálið við Planet Awards at heiðra føroyskum tónleiki í breiðari merking við heiðurslønum, framførslum og einum hugnaligum gallakvøldi, har tónleikarar og onnur kunnu hittast.

Heiðurslønirnar í ár fóru víða, og eingin vann meira enn eina Planet. Harafturat var tað eisini ein serligur heiður fyri Miðlahúsið at lata serliga Planet herðaklappið, sum í ár fór til helst fólkakærasta føroyska poppbólkin nakrantíð, Frændur. Í 25 ár hava Frændur ríkað okkara mentanarlív, sum fáir aðrir tónleikabólkar hava gjørt, og við nýggjari útgávu og hesum herðaklappi sum brennievni vóna vit, at vit hava Frændur sum livandi og skapandi tónleikabólk hjá okkum og millum okkum í nógv ár afturat.

**Sosialurin**

## Skilja ikki at fólk í fíggjarsektorinum skulu svíða meira enn onnur

**Opið skriv til Fíggjarnevndina í sambandi við uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lønhæddaravgjald**

Landsstýrið hevur í ólavsøkupakkanum uppskot um, at hækka partafelagsskattin úr 18% upp í 27% fyri peningastovnar og tryggingarfyritøkur. Hetta er síðani broytt til, at lønhæddaravgjaldið fyri peningastovnar og tryggingarfyritøkur hækkar við 5%, so tað verður 10%.

Uttan mun til hvørt talan er um tað upprunaliga uppskotið ella tað broytta uppskotið, so er tað ikki rímiligt, at tað er fíggjarsektorurin sum einsamallur skal gjalda ein størri skatt ella hægri avgjald.

Sum starvsfólk í fíggjarsektorinum skilja vit ikki, hví tað skulu vera vit, sum skulu svíða meira enn onnur í samfelagnum. Og tað er tað vit koma til, tí lítið er at ivast í, at eitt hægri lønhæddaravgjald (ella fyri tað hægri felagsskattur á peningastovnar og tryggingarfeløg), fer at hava við sær sparingar í teimum fyritøkum, sum vit arbeiða í. Av tí at lønarposturin er ein stórur postur hjá hesum fyritøkum, so er tað rættiliga vist, at tað verður á hesum posti, at sparingarnar verða framdar – ikki minst tá nú skatturin helst verður eitt lønhæddaravgjald. Hækkingin uppá 5% merkir fyri allar peningastovnarnar umleið 12-13 mkr., sum møguliga skulu sparast við at skerja lønarútreiðslurnar.

Sum umboð fyri starvsfólk í peningastovnunum og tryggingarfyritøkunum mótmæla vit, at tað bert eru tær fyritøkur, sum vit arbeiða í, sum skulu bera alla skattahækkingina á vinnufyritøkur. Tað hevði verið sømuligari og rættvísari, um allar vinnur bóru hvør sín part av hækkingini, eitt nú við at hækka partafelagsskattin fyri allar vinnufyritøkur. Við at tengja avgjaldið beinleiðis at lønarútgjaldingunum hjá fíggjarfyritøkunum, gevur hetta hesum fyritøkum eitt insitament til at spara á júst hesum útreiðsluposti, í mun til ein hægri partafelagsskatt, har alt virksemið hjá fyritøkuni inngongur. Onki er at ivast í at forhandlingsstøðan við komandi sáttmálasamráðingar innan fíggjarsektorin versnar munandi, um ætlaða broytingin verður framd, við tað at hesin útreiðslupostur er so høgur.

Í viðmerkingunum til uppskotið leggur Landsstýrið upp til, at hetta hevur til endamáls at tryggja virksemi í landinum. Hetta síggja vit sum eina beinleiðis andsøgn í mun til verandi uppskot. Tær umleið 13 mkr., sum peningastovnarnir samanlagt skulu rinda í eyka lønhæddaravgjaldi, svara til lønarútgjaldingar til eini 35 til 40 starvsfólk í peningastovnssektorinum, sum eru í vanda fyri at missa starvið orsakað av hesum. Samlaða talið av starvsfólkum í peningastovnunum í dag er á leið 600, og svarar hetta til ein møguligan niðurskurð í starvsfólkatalinum uppá 7%.

Nevndirnar í SFS og YT, sum eru partar av YFF (yrkisfelag hjá fíggjarstovnum í Føroyum), heita tí staðiliga á Landsstýrið um, at sleppa ætlanini um, at seta í gildi ætlaðu broytingarnar av lønhæddaravgjaldinum, sum einans skal hava ávirkan á fíggjarsektorin.

Avrit av hesum skrivi er sent Dimmalætting, Sosialinum og Norðlýsinum.

**Yrkisfelag hjá fíggjarstovnum í Føroyum**

## Hetta eigur ikki at bera til

**SNIÁLVUR RØVILSBERG**
fiskimaður, Sandur

Lógin í Føroya Fiskimannafelag er ikki hóskandi. Vit hava fingið sjón fyri søgn, at tað ber til hjá fólki, sum ikki eru limur í Føroya Fiskimannafelag at stilla ein mann upp, sum ikki hevur verið limur í felagnum í 40 ár sum formansvalevni. Her má okkurt gerast, tí tað ber ikki til, at fólk, sum ikki hava somu áhugamál sum fiskimaðurin, stilla upp til leiðandi postar í Fiskimannafelagnum.

Eg meti ikki, at Henrik Old hevur arbeitt fyri fiskimannin á tingi. Heldur er tað hin vegin, tí hann hevur verið við í kórinum, sum hava sungið um avtøku av inntøkutrygdini og skattafrádráttinum. Tað kann ikki vera so løgið, at man er skeptiskur, tí at Henrik hevur havt møguleikan at víst seg sum sjómannavin á tingi, og tað hevur hann tíverri fyri okkum fiskimenn ikki gjørt.

Eg vóni, at fiskimenn fara at taka undir við mær, tá eg sigi, at vit mugu verja okkara felag móti, at limir í øðrum fakfeløgum seta dagsskránna í Føroya Fiskimannafelag. Vit eiga at krevja, at lógin verður broytt, soleiðis at fiskimenn ikki koma í minniluta í egnum felag.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.